# LEIKSKRÁ

5. MAI 2024

SKRÁ NR. 4

SKÁLA ÍTRÓTTARFELAG 1965

betri DEILDIN

## 8. UMFAR

# HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 if@if.fo www.if.fo

**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur - Atli Petersen

**Uppsetan**
Jóhanna Langgaard


betri.fo
Betri tannár
Til tín millum 13 og 17 ár
Kort
Netbanki
Nýtslukonta
Uppsparingarkonta
Boðtænasta
betri
Fá ein ryggsekk, tá tú bíleggur títt fyrsta kort
Vitja eina av deildum okkara
betri

# INNIHALD

Dysturin í dag

Støðan í Betri deildini

TEAM ÍF

TEAM Skála ÍF

Dómarar

Toppskjúttar eftir 7 umfør

Minningarorð: Áku Petersen

ÍF-sangurin

INTERSPORT®
intersport.fo

taf.fo
the athlete's foot®



TEKST: BIRGIR PETERSEN

# DYSTURIN Í DAG

Vælkomin til dyst í Betri-deildini.  Seinasta umfar leiktu vit móti B36 í Gundadali, og vóru vit um reppi at fáa fyrsta sigurin í ár í hús, aftaná at vit vóru á odda 3-1 eitt skifti. Javnleikurin smakkaði tó væl, tí nú hava vit fingið fyrsta stigi og hava okkurt at byggja uppá.

Í dag fáa vit vitjan av Skála ÍF, sum teir nú kalla seg. Teir hava fingið eina fína byrjan uppá kappingarárið og hava longu lyft seg upp frá botninum. Teimum hevur eydnast at fáa stig móti beinleiðis kappingarneytunum og ikki móti toppinum. Hetta síggja vit tíverri alt meir til, at liðini í tyngra endanum leggja seg fløt fyri toppliðunum, og í staðin satsa alt uppá at vinná á sínum javnlíkum.

Nú er Jákup Martin Joensen settur sum venjari, og kann man siga at hann beinavegin hevur sett síni spor við at fáa okkara menn at præstera. Hann sigur í stuttari viðmerking at einasti vegurin fram er hart arbeiði, og er hann vísur í at okkara eru spentir og klárir til at geva alt tað, teir hava, og at tá vit nú hava fingið stig á kontuna, so er man líka sum komin í gongd.

Allir leikarnir eru tøkir uttan Ruben, sum er skaddur enn.

Góðan dyst øll somul.

Koyrið á drongir




**BÓLTASTUÐUL:**
Petur Abrahamsen




VÓNIN®

MILLUM FREMSTU MENNARAR,
FRAMLEIÐARAR OG VEITARAR AV
DYGDARGÓÐUM FISKIREIÐSKAPI

EFTIR 7 UMFØR

# STØÐAN

## Í BETRI DEILDINI HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Víkingur | 7 | 7 | 0 | 0 | 21 | 3 | 18 | 21 |
| 2 | HB | 7 | 6 | 0 | 1 | 15 | 5 | 10 | 18 |
| 3 | KÍ | 7 | 5 | 0 | 2 | 15 | 6 | 9 | 15 |
| 4 | NSÍ | 7 | 4 | 0 | 3 | 14 | 10 | 2 | 12 |
| 5 | B36 | 7 | 3 | 2 | 2 | 14 | 11 | 3 | 11 |
| 6 | 07 Vestur | 7 | 3 | 2 | 2 | 10 | 11 | -1 | 11 |
| 7 | Skála ÍF | 7 | 2 | 1 | 4 | 11 | 13 | -2 | 7 |
| 8 | EB/Streymur | 7 | 1 | 1 | 5 | 9 | 13 | -4 | 4 |
| 9 | B68 | 7 | 0 | 1 | 6 | 3 | 15 | -12 | 1 |
| 10 | ÍF | 7 | 0 | 1 | 6 | 6 | 31 | -25 | 1 |

WWW.DYSTIR.FO

### 8. UMFAR

| | |
|---|---|
| 04.05.24 | B68 - NSÍ |
| 04.05.24 | EB/Streymur - Víkingur |
| 04.05.24 | KÍ - 07 Vestur |
| 05.05.24 | ÍF - Skála ÍF |
| 05.05.24 | HB - B36 |

### 9. UMFAR

| | |
|---|---|
| 12.05.24 | KÍ - Víkingur |
| 13.05.24 | B36 - EB/Streymur |
| 13.05.24 | NSÍ - 07 Vestur |
| 13.05.24 | Skála ÍF - HB |
| 14.05.24 | B68 - ÍF |

INNIHALD

# KES.FO

**HVS - VENTILATIÓN - HITAPUMPIR - SERVICE**

Hjá Klima Energi Service leggja vit okkum eftir at veita dygdarvørur og -tænastur innan hita, ventilatión og orkuoptimering. Harafturat bjóða vit eftirlit av hitapumpum og ventilatiónsskipanum, bæði til privat og vinnu.

Tørvar tær eina nýggja hitapumpu ella ventilatións- og luftskiftisskipan, ella vilt tú hava vegleiðing um orkuskifti, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.




**INFO@KES.FO - WWW.KES.FO - 258030**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Jákup **Nolsøe** (M) | 1 | Jóhann **Højbro** | 16 |
| Elvio **Gelmini** | 2 | Jákup **í Lambanum** | 17 |
| Peter **Ullum** | 3 | Petur M. **Lundsbjerg** | 18 |
| Karl **Løkin** (L) | 6 | Rúnar **Johnsson** | 19 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 | Tonni **Thomsen** | 20 |
| Bogi **Reinert-Petersen** | 8 | Kasper **Sommerstedt** | 21 |
| Ruben **Nielsen** | 10 | Elias **Lervig** | 22 |
| Markus **á Lakjuni** | 11 | Rógvi **Matras** | 23 |
| Gundur **Petersen** | 14 | Bergur **Jacobsen** | 24 |
| Kenny **Jensen** (M) | 15 | Jhon **Mena** | 25 |

Høvuðsvenjari: **Jákup Martin Joensen**
Hjálparvenjari: **Ólavur Larsen**

**INNIHALD**

SKÁLA
ÍTRÓTTARFELAG
1965

| | |
|---|---|
| Karstin **Hansen** (M) | 1 |
| Markus **Hellisdal** | 3 |
| Jákup **Jakobsen** (L) | 4 |
| Ragnar **Skála** | 5 |
| Nicolai **Dohn** | 6 |
| Kristian Martin **Jakobsen** | 7 |
| Djóni **Petersen** | 8 |
| Carlos **Ferreira** | 9 |
| Karl Martin **Johansen** | 12 |
| Ragnar **Lindholm** (M) | 13 |
| Marjus **Nón** | 14 |
| Bjarti **Thorleifsson** | 15 |
| Pætur **Hentze** | 15 |
| Jákup P. **Frederiksberg** | 17 |
| Markus **Isaksen** | 20 |
| Meinhard **Janusarson** | 21 |
| Dávid **Johansen** | 23 |
| Ervin **Rasmussen** | 24 |
| Teitur **Poulsen** | 26 |

Høvuðsvenjari: **Pauli Poulsen**
Hjálparvenjari: **Bogi Gregersen**

INNIHALD

DÓMARI

Alex **Troleis**

1. HJÁLPARDÓMARI

Jógvan **Breckmann**

2. HJÁLPARDÓMARI

Emil **Sørensen**

4. DÓMARI

Rúni **Gaardbo**

DÓMARAEYGLEIÐARI

Aron Sofus **West**

INNIHALD




# Vit trúgva vit uppá tann **góða arbeiðsdagin**

Við okkara kjarnuøkjum, **tøkni, verksetan og røkt**, veita vit vørur og tænastur, sum skapa ein betri arbeiðsdag.

Framskák er samansett av serfrøðingum og ráðgevum, og hevur síðani 2013 verið álítandi veitari av vørum og tænastum til føroyska vinnulívið.

Framskák




Green Marine Divers

Tlf.: +298 77 00 60

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP

SPEKT | løggildir grannskoðarar

**Tórshavn**
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

**Klaksvík**
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo



# TOPP 10

## MÁLSKJÚTTAR Í BETRI DEILDINI

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Páll **Klettskarð** (KÍ) | 9 |
| 2 | Petur **Knudsen** (NSÍ) | 6 |
| 3 | Áki **Samulsen** (HB) | 5 |
| 4 | Finnur **Justinussen** (Víkingur) | 5 |
| 5 | Poul **Kallsberg** (Víkingur) | 5 |
| 6 | Marius **Kryger Lindh** (B36) | 4 |
| 7 | Ejvind **Mouritsen** (HB) | 3 |
| 8 | Emil **Pedersen** (07 Vestur) | 3 |
| 9 | Filip **Brattbak** (07 Vestur) | 3 |
| 10 | Geza Dávid **Turi** (Víkingur) | 3 |

WWW.DYSTUR.FO

INNIHALD

# MINNINGARORÐ ÁKU PETERSEN

*Skrivað av Petur Simonsen*

*Les meira*



Áku farin!

Kemparin møtti sínum yvirmanni og tapti dystin. Rógvarin hevur lagt árarnar inn eftir harðan andróður seinasta teinin. Í manna eygum alt ov ungur og alt ov tíðliga. – Tó, Harrans vegir eru ikki okkara vegir!

Vit hava kenst frá smádreingjaárunum, men tað var ikki minst í ungdóminum og manndóminum, at vinskapurin mentist rættiliga. Fyrst og fremst tí og sum samverkamenn í ÍF í 1970'unum og 1980'unum. Eitt vinarlag sum hevur hildið øll árini, hóast vit fluttu úr Fuglafirði fyri 33 árum síðani.

Nøkur menniskju, sum koma á tína leið, hevur tú lættari at vera góður við. Tey hava okkurt, sum ikki altíð er so lætt at greina, men sum ger teg tryggan. Tú kennir,

at tey eru at líta á. Tey eru erlig. Sum oftast mild og vinarlig. Aðrar tíðir kanska meira bersøgin. Men altíð rættvís, trúføst og hjálpsom.
Soleiðis kendi eg Áku og soleiðis vóru viðurskiftini okkara millum!

Sum hjá dreingjum flest í Fuglafirði, so spældi Áku fótbólt og hondbólt øll barnaárini.
Ongin skipað venjing ella kapping var tá. Vøllurin var økið innanfyri kaiina, sum varð tikin í brúk í 1949.
Á kaiini og økinum rundanum var so mangt annað, sum eggjaði bragdarhugin og forvitnið hjá einum lívligum smádreingi. Skipini – føroysk og útlendsk. Saltfiskur og fiskakjallari. Sildatunnur og skúrar. Gørn og trossar. Glúpur og tráða. Fjøra og flakar. Alt bert nakrar metrar frá barnaheiminum.

Vøllurin á Trøðni, ella Plenan, sum vit plagdu at kalla hann, varð tikin í brúk á heysti í 1956. Tá flutti spæliplássið partvíst av kaiini og niðan í Fløtugerði. Har var Skarðsá og svimjihylurin eisini. Og Áku smæddist ikki burtur – hvørki á vøllinum ella í hylinum. Fimur, djarvur og ágrýtin sum fáur.

Áku man, sum so nógv onnur børn tá, ikki minst dreingirnir, hava glett seg til, at "skúlin er liðugur". Og tað bleiv hann fyri Áku, tá hann var 14 ár.

Sum hjá so mongum unglinga tá í tíðini, so var tað

sjógvurin sum dróg. Tað mundi heldur ikki ganga drúgv tíð, eftir at skúlin var lagdur aftur um bak og hann hevði fingið prestsins hond á høvdið, at Áku stóð á skipsdekki.

Men Áku varð ikki "sjómaður fyri lívið". Hann fór, eins og beiggin, Hjørleif, í læru hjá Jákup Paula Joensen, málarameistara.
Hetta er "gitarí", men ivaleyst hevur hugurin eftir at sleppa at spæla bólt talt eitt sindur við í avgerðini hjá Áku um at fara av skipsdekki og gerast málari.
Í hvussu er og ikki, so var tað ein fongur fyri ÍF, at Áku gjørdist landkrabbi.

Frá mitt í 60-unum mentist ÍF sum fótbóltsfelag. Hondbólturin dragnaði og fótbólturin tók meir og meir yvir. Í 1971 spælir ÍF á fyrsta sinni í bestu deildini, og í 1979 gerst felagið føroyameistari.
Felagsnevnarin í 1966, 1971 og 1979, og eisini flestu árini harímillum, var Áku saman við Sam Jacobsen. Og nú eru teir báðir farnir.
Teir vóru mentanarberarar og undangongumenn í menningini, sum hendi frá 1966 til 1979. Teir vóru við í tí tíðini, tá fótbólturin í bygdini – venjing og kapping – var meira tilvildarligur og óskipaður. Teir vóru í bestu árum og berandi leikarar, tá felagið í 1971 tók djarva stigið, at meldað til í 1. deild og bjóða teimum "stóru" av. Og teir vóru eisini sera týðandi leikarar, tá ÍF gjørdist føroyameistari í 1979.

Men Áku misti seg ongantíð burtur í hesum. Altíð heilhjartaður og nærlagdur á vøllinum og ein hollur stuðul í felagnum annars. Ein undangongumaður og fyrimynd fyri okkum onnur. Ein ítróttarmaður í orðsins sanna týdningi. Eitt navn, sum gav afturljóð í føroyska fótbóltsheiminum.

Í juni 1973 vóru boð eftir Áku til fótbóltslandsliðið. Fyrri dysturin var móti Hetlandi. Seinni dysturin, sum var móti Orknoyggjum, gjørdi Áku einsamalla málið hjá Føroyum í 2-1 tapinum. Áku gjørdist tí næsti fuglfirðingur á fótbóltslandsliðinum. Sam, sum leikti ein dyst í 1972 móti Íslandi, var tann fyrsti.

Okkurt árið róði Áku kapp við 10-mannafarinum Fuglfirðingi, og gjørdist eisini føroyameistari í kappróðri.

Hóast tað segðist – enntá við blómuhandan á vøllinum og lýst í miðlunum – at Áku gavst við fótbóltinum, nú hann gjørdist føroyameistari við ÍF í 1979, so helt hann ikki orð. Tí í 1981 var hann aftur millum teir, sum spældu sunnudagsfótbólt. Men tá vóru meira enn 20 ár farin aftur um bak í tænastuni fyri barndómsfelagið ÍF, og tíðin var nú komin at siga takk fyri seg sum fótbóltsleikari í fremstu røð!

Seinni gjørdist Áku venjari hjá ungligum og øðrum

ungdómsliðum í felagnum, og var annars felagnum ein dyggur stuðul, so leingi orkan var til tað.

Ein líti søga frá skúlatíðini soleiðis, sum eg minnist hana.
Onkur aftast í flokkinum hevði helst verið eitt sindur ólátaður, og Herluf gjørdi seg til at fara oman at geva hesum nøkur álvarsorð. Komin hálva leið rópar Áku: "Herluf! Spæl ein góðan!" Herluf steðgar á, fer framaftur til klaverið at spæla "Hann rann sær kátur ..."
Áku, ólátaði drongurin og øll hini í flokkinum høvdu eina frálíka løtu við nógvum sangi úr Føroya Fólks. Soleiðis var Áku – ein "friðarmaður"!

Dysturin er av og báturin er drigin upp. Tað verða ikki fleiri túrar við bustimaskinuni eftir vøllinum. Og tað verður ein færri á vegnum við greiðum meiningum um hvussu fótbóltur skal spælast. ÍF hevur mist ein undangongumann, ein trúfastan stuðul og eina stóra fyrimynd.
Og eina røddin i Thabor-kórinum er tagnað. Hon er nú hon í tí stóra kórinum – tí himmalska!

Góða Pállfríða! Missurin er tó størstur hjá tær og tykkara kæru børnum og barnabørnum.

Vil heilsa tær við troystarríku orðunum úr Esaias 40: 29-31: "Hann gevur hinum troytta kraft og hinum máttleysa mikla styrki. Unglingar møðast og verða

máttleysir, ungir menn noyðast at lúta. Men tey, sum bíða eftir Harranum, fáa nýggja kraft ...”

Friður veri við minninum um Áku Petersen!

Petur Simonsen



*ÍF 1966. Afv.: Hjalmar, Sam, Petur Jacob, Karl Jørgen, Sofus og Áku. Mfv.: Kristin, Napoleon og Jógvan. Ffv.: Martin, Petur og Birgir.*



*ÍF 1971: Afv.: Sam, Jákup Frants, Signar, Áku, Jógvan og Herman. Ffv.: Leivur, Hans C, Steinbjørn, Birgir og Hans Elias*




*ÍF 1979: Afv.: Jan, Sonni, Jón, Poul, Ábraham, Herman, Hans Elias, Meinhardt og Ronny. Ffv.: Sam, Kaj Eli, Kristian; Steinbjørn, Ovi, Birgir og Áku.*



*Fuglfirðingur gjørdist føroyameistari í 1967 og 1968.*
*Afv Ólavur, Kári, Jim, Martin, Áku og Kári.*
*Ffv.: Hans Olaf, Bergtórur, Kári, Tórfríður og Napoleon.*



*Í september 2014. Áku skipaði fyri eini hugnaløtu fyri teimum, sum mannaðu 1979-liðið. Her við búgvi borð í hugnaliga heiminum hjá Pállfríðu og Áku.*



*Í september 2014. Áku skipaði fyri eini hugnaløtu fyri teimum, sum mannaðu 1979-liðið.*

NÝRÙM

Teknistova

einar@nyrum.fo

tlf 78 88 99



BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast

magn

# Leiðandi reiðari í norðurhøvum




**VARÐIN**
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo




Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO

# SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**